# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# FCK nærkast toppinum

*Todi Jónsson er framvegis plágaður av skaðanum, hann fekk í Føroyum fyri smáum tveimum vikum síðani*

Lagið var einki serligt í Aalborg mánakvøldið. FCK var á vitjan, og teir 7.163 áskoðararnir sóu gestirnar vinna 2–1 og harvið fara við øllum stigunum. Harvið er AaB komið so tætt at botninum, at talan verður um botndyst, tá AGF og Óli Johannesen komandi sunnudag fara at vitja í Aalborg.

Men tað píndi áskoðararnar uppaftur meiri, at Ståle Solbakken, sum inntil fyri tveimum vikum síðani var stóra miðvallarstjørnan og mest avhildni spælarin í AaB, hesa ferð umboðaði FCK. Tað gjørdi norðmaðurin so frágera væl, at hann av hyggjarunum hjá TV3+ varð kostin besti maður á vølli, og tað var ikki so undarligt.

AaB kom á odda í 13. minutti eftir hornaspark. FCK var leingi illa kroyst av heimaliðnum, sum ferð eftir ferð spældi seg ígjøgnum í borðunum. Men eftir ein hálvan tíma var ein annar norðmaður hjá FCK, Harald Brattbakk, brádliga púra leysur á AaB hálvuni. Hann megnaði at halda verjuspælararnar aftanfyri seg, dró ímóti málinum og setti bóltin við síðuna av Jimmy Nielsen og í málið til 1–1.

Í 2. hálvleiki hevði FCK betri tak á. Og í 65. minutti fingu teir sigursmálið. Málskjútti var eingin annar enn Ståle Solbakken, sum í 2. hálvleiki var sannur miðvallargeneralur. Málið var meinlíkt tí, sum Dánial Hansen úr NSÍ sunnudagin stútaði ímóti B68.

### Todi er á veg

Undan vikuskiftinum ljóðaði í onkrum donskum fjølmiðlum, at Todi Jónsson skuldi vera í FCK hópinum mánakvøldið. Todi var ikki í Aalborg. Hann sat heima við hús í Keypmannahavn og fylgdi við og frøddi seg um, at hansara lið nú hevur vunnið tríggjar dystir á rað.

Sjálvandi vil Todi fegin spæla við hvørja ferð, og tað er neyvan nakrar vandi fyri, at hann ikki sleppur framat, tá hann verður tøkur aftur. Bæði hesa ferð og tá FCK mikukvøldið vann 1–0 á heimavølli ímóti AB, var Thomas Thorninger á miðvallarplássinum í vinstru. Avrikið hjá honum hesar báðu ferðirnar bendi ikki á, at plássið hjá Toda er hótt.

Síðani landsliðsferðina í Føroyum hevur Todi fingið viðgerð í lærinum, og hann hevur vant fyri seg sjálvan. Í gjár var møguleiki fyri, at hann í dag ella í morgin fer at venja saman við hinum.

FCK, sum bara er tvey stig frá oddasessinum, skal sunnudagin spæla á heimavølli ímóti OB, sum hevur Johan B. Hansen í hópinum. Sum nevnt omanfyri so skal AGF við Óla Johannesen í hópinum spæla í Aalborg. Herfølge og Jákup Mikkelsen skulu sunnudagin spæla á heimavølli ímóti FC Midtjylland.

JH



*Væntandi fer Todi Jónsson aftur undir regluligu venjingina í dag ella í morgin*

# Runt Agnið 2000

Leygardagin skipar Roysnið fyri árligu rennikappingini Runt Agnið. Nógvir rennarar hava seinnu árini roynt kreftir við henda strævna 10,5 km langa teinin.

### Teinurin

Byrjað verður við skúlan á Toftum. Runnið verður úteftir gjøgnum Tofta bygd, niðan Heygarnar, út á Nes og niðan á Agnið. Runnið verður so oman móti Runavíkini, út gjøgnum Saltnes og á mál á Tofta kei.

Bestu tíð, menn vita um, 35,48 min., rann Niels Jákup Jakobsen í 1990. Í fjør vann A. Marni Joensen við tíðini 36,42 min.

### Við í Daewoo kappingini

Kappingin Runt Agnið er samstundis triðja og næstseinasta umfar av Daewoo Marathon Cup. Favorittar at vinna kappingina leygardagin eru Guttorm Sørensen og Rigmor N. Joensen, ið eisini liggja á odda samanlagt. Guttorm Sørensen hevur higartil nýtt 1.32,59 tím. at renna teir fyrstu 26,1 km av Marathon kappingini. Honum á baki er Signar Røsvik, ið bert er 9 sek. aftanfyri, meðan Cecil Weihe er 6,17 min aftanfyri Signar.

Bert tvær kvinnur luttaka í samlaðu kappingini. Rigmor N. Joensen hevur undan kappingini tíðina 1.45,10 tím., meðan Bryndis Weihe hevur tíðina 2.30,44 tím.

Kappingin leygardagin byrjar kl. 12.05, og tilmelding er við skúlan á Toftum hálvan tíma fyri kappingina.

# Favoritturin vann

*Aftur í ár gjørdist Rógvi Johansen skjótastur í einkultstartinum, og hetta er nú sjeyndu ferð, at Rógvi er FM-vinnari í 30 km einkultstarti*

Teinurin, sum súkklaður vaðr, var hin sami sum undanfarin ár. T.v.s at súkkla varð frá Eystara Ringvegi, inn til Kaldbak, og so allan teinin aftur til Havnar, har startur og mál var árakað bygningin hjá Elektron.

Rógvi Johansen hevur føroyska metið á hesum teini, og tá sæð verður burtur frá kappingini í fjør, hevur hann á hvørjum ári megnað at skorið eitt gott petti av sínari bestu tíð.

Í ár vann hann við tíðini 41 minuttir og 5 sekundir, og aftur hesu ferð varð talan um met. Gamla metið var 42,25. Rógvi hevði annars ikki roknað við, at tað fót at bera honum til at luttaka. Við stuli frá Fa. Ellen Dahl og bygdarfólki annars í Vági, eydnaðist tað honum kortini at koma heim, og var hann sjálvandi fegin um hetta.

Rógvi hevur annars áður ført fram, at hann harmast um, at FM-kappingarnar ikki verða avgreiddar um eitt vikuskifti. Nakað sum forðaði honum í at verja heitið á 100 km teininum.

### Sverri nr. 2

Var tað væntað, at Rógvi vann kappingina, var tað heldur óvæntað Sverri Mohr Edvinsson, sum fekk fatur í silvurplássinum. Tað eydnaðist Sverra at vinna á favorittinum til hetta, Gunnar Dahl Olsen, við 10 sek.

Sum vera man var Sverri fegin um hetta, men Gunnar Dahl Olsen var hinvegin als ikki nøgdur. Í mun til kappingina í fjør, vóru umstøðurnar at súkkla nógv betri, men kortini var tíðin hjá Gunnari meira enn ein minutt verri enn ta ferðina.

Einasta kvinnan, sum luttók í kappingini, var Rigmor N. Joensen. Hon er annars mest kend fyri renniavrik síni, men hon megnaði tó at súkklað teir 30 km undir tímanum, og verður hetta mett sum eitt sera gott úrslit.

Kappingina hjá unglingum vann Eirikur Olsen, meðan Eyðun Poulsen vann kappingina hjá monnum yvir 40 ár.

**FM-einkutstartur, úrslit**

| Menn | 1/2 ml. tíð | endalig tíð | km/t |
|---|---|---|---|
| Rógvi Johansen | 20,36 | 41,05 | 42,2 |
| Sverri M. Edvinsson | 23,39 | 46,23 | 37,4 |
| Gunnar D. Olsen | 23,32 | 46,33 | 37,4 |
| Beinir Rasmussen | 24,20 | 48,13 | 36,0 |
| Christian Guttesen | 24,56 | 48,43 | 35,6 |
| Esmar Joensen | 25,11 | 49,22 | 35,1 |
| **Veteranar** | | | |
| Eyðun Poulsen | 25,36 | 49,48 | 34,8 |
| Kári Simonsen | 25,50 | 50,32 | 34,3 |
| Evald Rasmussen | 26,11 | 51,13 | 33,9 |
| **Kvinnur** | | | |
| Rigmor N. Joensen | 29,38 | 58,05 | 29,9 |
| **Unglingar** | | | |
| Eirikur Olsen | 30,53 | 1.00,28 | 28,7 |
| Kristian Niclasen | 31,29 | 1.00,32 | 28,6 |



# AB snávaði ímóti botnliði

***3. deild:** Alt bendir á, at tað verður Skáli, sum fer at flyta beinleiðis upp, meðan argjamenn skulu spenna seg út, um teir skulu verða fullvísir í at fáa rættin at spæla um eitt pláss í næstbestu deildini*

Nú tvey umfør eru eftir, bendir alt á, at tað verður Skáli, sum fer at flyta beinleiðis upp í næstbestu deildina. Skálamenn eru trý stig undan næstu kappingarneytunum. Næsti kappingarneytin er AB. Um tað eftir átjan umfør fer at standa á jøvnum í stigum, so verður avgerandi, hvussu tað hevur hilnast í innanhýsis uppgerðunum. Har er Skáli betri fyri. Tá teir vóru á Argjum, vunnu teir 5–3. Tá AB var á Skála, vunnu teir 2–1. Tað vil við øðrum orðum siga, at í innanhýsis uppgerðunum er Skáli eitt mál betri enn AB, og tað er nóg mikið sum kvalifikatión til beinleiðis uppflyting – um tað fer at standa á jøvnum í stigum.

Spurningurin er so, hvussu vánirnar kunnu metast at vera hjá fremstu liðunum. Skáli skal sunnudagin í Gundadal at spæla ímóti B36, sum avgjørt er við í kappingini um gullkrónurnar (B36 kann ikki flyta upp, tí teir hava longu lið í næstbestu deildini). B36 er trý stig aftanfyri Skála, sum vann heimadystin ímóti B36 1–0. Tað vil við øðrum orðum siga, at um B36 sunnudagin skal taka oddasessin, so skulu teir vinna við meiri enn einum máli (Skáli hevur betri málúrtøku enn B36).

Tað er møguleiki fyri, at AB sunnudagin fer at styrkja um sína støðu, men teirra uppgáva verður ikki løtt á Svangaskarði. Ikki minst tá hugsað verður um, at teir í 16. umfarinum ikki megnaðu meiri enn javnleik ímóti ÍF, sum næstsíðst fekk javnleik á Toftum.

### Tungi endin

Í síðsta umfarinum fær AB vitjan av B36, meðan Skáli eigur lættan heimadyst ímóti TB. Spurningurin er so, um TB fer at møta upp. Sunnudagin møttu teir ikki á Sandi. Sandoyingar fingu stutt undan dystinum at vita av Tvøroyri, at teir vóru ikki førir fyri at manna lið. Hetta er onnur ferðin í ár, at TB ikki møtir upp á útivølli. 13. august skuldu teir havt spælt á Toftum, men tá vann B68 tey trý stigini við málmuninum 0–0.

Í grein 37 í kappingarreglunum fyri fótbólt verður sagt, at um lið uttan haldgóða orsøk ikki møtir til dyst, kann liðið verða koyrt úr kappingini. Higartil hevur kappingarnevndin gjørt lítla (ella onga) nýtslu av hesari greinini. Spurningurin er, hvat teir gera, nú eitt lið ikki er møtt til fleiri útidystir.

Um tað verður, sum tað plagar at vera – at liðið sum bíðar eftir einum liði, ið ikki møtir, fær trý stig við málmuninum 0–0 – so verður stríðið um beinleiðis niðurflyting ein uppgerð ímillum KÍ og ÍF, sum av álvara er farið undir bjargingarroyndina. Leikluturin hjá KÍ í 3. deild komandi ár er eisini treytaður av, hvussu tað fer at gangast í finaluni í 4. deild. Har skulu klaksvíkingar leygardagin spæla finalu ímóti gøtumonnum. GÍ flutti í fjør niður úr 3. deild.

### VB–FS Vágar

Í 1. deild vóru vágamenn sendir úr Vági við 6–0 í viðførinum. Byrðin hjá 3. deildarliðnum var lítið minni. VB vann 5–0. Tað vil siga, at ellivu mál vórðu skorað ímóti FS Vágar, og at vágamenn einki málið fingu burturúr Suðuroyar ferðini. Tað man kennast lítið hugaligt.

Stóri málskjúttin hjá vágbingum var hesa ferð. Hans Jákup Hjelm, sum hesa ferð var í álopinum saman við Marner Richard. At hann skoraði trý mál vísir, at hann ikki bara er kringur at syngja um heimbygdina Vágur, er viðmerkingin úr Vági.

### Skáli–B68

Tað sást ikki á spælbýtinum, at talan var um oddaliðið og eitt av teimum í niðara endanum. Heimaliðið legði sera bragdliga fyri, og longu í 8. minutti fingu teir hol á. Bæði í hesum førinum, og tá Skáli økti í 63. minutti, var málskjúttin Sveinur Justinussen. Blaðungi miðvallarin í vinstru hevur fín fótbóltsevni.

Í báðum førunum hevði spælandi venjarin, Kaysten Rasmussen, næstsíðsta fótin á. Í fyrra førinum varð bólturin lyftur inn um verjuna, og í seinna umførinum kom innleggið úr vinstru, og Sveinur Justinussen fluktaði við handara stólpan aftanfyri Jóhan Dávur Højgaard, sum hesa ferð loysti Kjartan Nesá av í málinum.

B68 hevði nógv spæl, og teir høvdu eisini fleiri málmøguleikar. Men tað var ikki fyrrenn í síðsta minuttinum, at teir pyntaðu um. Aftasti maður, Odmar Andreassen, var tryggur úr ellivu metrum.

### KÍ–B36

Klaksvíkingar høvdu mannað seg væl fyri at fáa so mikið burturúr, at teir skuldu fara av aftasta plássinum. Tað var eingin munur á toppliðnum og botnliðnum. Men hóast KÍ var frammanfyri tvær ferðir, so vóru tað gestirnir úr B36, sum fóru við øllum.

Rúni Elttør setti hol á við stútara eftir horna, men B36 hevði ikki meiri enn givið bóltin uppaftur, so lá hann í KÍ málinum. Ólavur Kjølbro legði KÍ framum aftur við langskoti.

Í 2. hálvleiki leikaði tætt á. Hans Jákup Heinesen javnaði beinanvegin, og tá tað restaðu fjúrtan minuttir, skoraði Ólavur Debes sigursmálið. Hann hevði verið á vøllinum í ellivu minuttir, tá hann gjørdist dagsins maður hjá B36.

### AB–ÍF

Talan var um stórt vónbrot hjá argjamonnum. Teir vóru favorittar, og tá teir í 74. minutti øktu til 3–1 (Svend Poulsen skoraði, eftir at Magnus Hentze hevði lagt út frá úr vinstru), bendi alt á, at AB skuldi senda fuglfirðingar tómhentar til hús aftur.

Men ÍF vildi ikki geva seg. Teir megnaðu 3–3 javnleik, og at enda var um reppið, at teir fóru við øllum. Ken Bærentsen minkaði um munin við einum av sínum hegnisligu fl-tu skotum úr horninum á brotsteiginum, og hann javnaði til 3–3 upp á brotsspark. Ellivu metur dómurin stóðst av, at AB verjan tók beinini undan Martini Hansen. Í síðstu løtu hildu bæði argjamenn og fuglfirðingar, at beinini enn eina ferð vórðu tikin undan Martini Hansen, men tað helt dómarin ikki. Og so varðveitti AB eina stigið.

ÍF kom á odda beinanvegin, tá Jógvan Arnfinn Jacobsen stútaði horna úr høgru í kassan. Eftir ein stívan hálvan tíma javnaði Magnus Hentze eftir uppspæl í høgru. Fram ímóti steðginum legði Sigurd Justinussen innfyri úr vinstru, og eftir tvær royndir eydnaðist tað Svend Poulsen, toppskjúttanum í deildini, at fáa bóltin inn um Allan Joensen. So var tað, at AB økti, og at ÍF kom afturíaftur. AB vónar framvegis, at teir skulu gera skjótt av í deildini, og ÍF, sum hevur fingið nakrar veteranar at hjálpa til, vónar, at teir aftur komandi ár skulu eiga rættin at spæla í 3. deild.

JH

### Úrslit

**15. umfar**
(allir málskjúttarnir vóru ikki upplýstir í síðstu viku)
B71–Skáli 3–5 (1–2)
0–1: Kaysten Rasmussen br
2.
1–1: Ib Mohr Olsen 16.
1–2: Kaysten Rasmussen 44.
2–2: Páll á Reynatúgvu br 49.
2–4: Arnhold Berg 65.
2–3: Jørmund Joensen 77.
2–5: Marius Joensen 80.
3–5: Alex Nielsen 83.

**16. umfar**
**VB–FS Vágar 5–0 (2–0)**
1–0: Marner Richard 31.
2–0: Hans Jákup Hjelm 37.
4–0: Alfred Wøldike 59.
3–0: Hans Jákup Hjelm 74.
5–0: Hans Jákup Hjelm 77.

**Skáli–B68 2–1 (1–0)**
1–0: Sveinur Justinussen 8.
2–0: Sveinur Justinussen 63.
2–1: Odmar Andreasen 90. br

**KÍ–B36 2–3 (2–1)**
1–0: Rúni Elttør 11.
1–1: Allan Manai 12.
2–1: Ólavur Kjølbro 31.
2–2: Hans Jákup Heinesen 47.
2–3: Ólavur Debes 76.

**B71–TB**
B71 uttan dyst

**AB–ÍF 3–3 (2–1)**
0–1: Jógvan Arnfinn Jacobsen 2.
1–1: Magnus Hentze 33.
2–1: Svend Poulsen 44.
3–1: Svend Poulsen 74.
3–2: Ken Bærentsen 75.
3–3: Ken Bærentsen 81. br

**17. umfar**
verður 17. september

FS Vágar–B71
B68–AB
B36–Skáli
TB–KÍ
ÍF–VB

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Svend Poulsen | AB | 21 |
| Kristoffur Vidtfeldt | B71 | 15 |
| Petur Niclasen | FS Vágar | 14 |
| Aksel Højgaard | B68 | 13 |
| Pauli Hansen | Skála | 12 |
| Signar Johannesen | AB | 11 |
| Magnus Simonsen | FS Vágar | 11 |
| Egill Steintórsson | VB | 10 |
| Oddbjørn Joensen | AB | 9 |
| Per Joensen | VB | 9 |
| Regin Arge | B36 | 8 |
| Kaysten Rasmussen | Skála | 8 |
| Kaj Roest | TB | 8 |
| Hans Christian Djurhuus | Skála | 7 |
| Marius Joensen | Skála | 7 |
| Hallur Christiansen | TB | 7 |
| Jákup Olsen | B68 | 6 |
| Páll á Reynatúgvu | B71 | 6 |
| Jákup Baldvinsson | ÍF | 6 |
| Jógvan Arnfinn Jacobsen | ÍF | 6 |
| Ken Bærendsen | ÍF | 6 |
| Kári í Lágabø | VB | 6 |
| Tumas Eli Hansen | B36 | 5 |
| Aksel Johannesen | KÍ | 5 |
| Eyðun Svalbard | TB | 5 |
| Jóhannes Johannesen | TB | 5 |
| Fróði Stenberg | AB | 4 |
| Magnus Hentze | AB | 4 |
| Dánial Petur Johansen | B36 | 4 |
| Vinjard Guttesen | B36 | 4 |
| Eirikur Poulsen | B71 | 4 |
| Jónsvein Thomsen | B71 | 4 |
| Sjálvmál | B71 | 4 |
| Bárður Andreasen | KÍ | 4 |
| Leon Bjartalíð | KÍ | 4 |
| Jón Rasmussen | Skála | 4 |
| Jørmund Joensen | Skála | 4 |
| Just Johannesen | TB | 4 |

**Støðan, 3. deild menn**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 16 | 11 | 1 | 4 | 61 | 34 | 27 | 34 |
| 2 | B36 | 16 | 10 | 1 | 5 | 46 | 23 | 23 | 31 |
| 3 | AB | 16 | 10 | 1 | 5 | 73 | 38 | 35 | 31 |
| 4 | VB | 16 | 9 | 1 | 6 | 48 | 42 | 6 | 28 |
| 5 | B71 | 16 | 9 | 0 | 7 | 52 | 44 | 8 | 27 |
| 6 | TB | 16 | 6 | 2 | 8 | 44 | 44 | 0 | 20 |
| 7 | B68 | 16 | 4 | 5 | 7 | 38 | 39 | -1 | 17 |
| 8 | FS Vágar | 16 | 5 | 2 | 9 | 45 | 59 | -14 | 17 |
| 9 | ÍF | 16 | 4 | 2 | 10 | 39 | 54 | -15 | 14 |
| 10 | KÍ | 16 | 4 | 1 | 11 | 38 | 107 | -69 | 13 |